Toll- og Skattstova Føroya

# Rokningskaparstarv

**Starvið sum leiðari fyri Roknskapar- og bókhaldsdeildini**
í stýrinum á Argjum verður hervið lýst leyst at seta í seinasta lagi 15. august 2003.

**Arbeiðsuppgávurnar verða millum aðrar:**

- at hava roknskapar- og bókhaldsskyldugu ábyrgdina av lands-, kommunu- og kirkjuskskattinum og gjøldunum til teir grunnar, Toll- og Skattstovan umsitur. Hertil kemur eisini roknskaparligu ábyrgdina av innkrevjingarskipanini (IK),
- at hava ábyrgdina av, at Roknskaparreglugerðin verður viðlíkahildin, og at allar deildir hjá Toll- og Skattstovuni nýta hana,
- at samstarva/hava samskifti við Føroya Gjaldstovu um allar roknskaparligar spurningar, sum knýta roknskaparhaldið hjá Toll- og Skattstovuni saman við FSL og harvið roknskaparframløguna í Landsroknskapinum,
- at leggja innanhýsis mannagongdir til rættis og skipa fyri bæði innan- og uttanhýsis kunning um roknskapar- og bókhaldsspurningar,
- at geva leiðbeining og hjálp til økini í samband við roknskapar- og bókhaldsspurningar og
- at hava um hendi alt samskifti viðvíkjandi roknskapar- og bókhaldsspurningum annars við Føroya Gjaldstovu, Landsgrannskoðanina og onnur.

**Førleikakrøv**
Tann, sum settur verður, skal hava góða roknskaparliga útbúgving helst frá hægri lærustovni . Kunnleiki til almenna fyrisiting kann geva fyrimun. Teldukunnleiki á brúkarastøði er eitt krav. Vit vænta okkum ein arbeiðssaman og fyrikomandi persón, sum skal kunna arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit kunna bjóða**
Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini er fakliga krevjandi og við møguleikum fyri eftirútbúgving, v.ø.o. eitt sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi.

**Setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Nærri frágreiðing um starvið**
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Marjun R. Simonsen, stjórnarskrivara á tlf. 35 26 00.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi

**4. august 2003.**

Toll- og Skattstova Føroya
Stýrið
Postsmoga 2151
FO 165 Argir

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum.

Uppgávur stovnsins eru m.a. at fyrisita
• skattalógina
• tolllógina
• mvg-lógina
• kolvetnisskattalógina
• avgjaldslógirnar,
eins og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økis-skrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

Starvið er nýtt og kemur tann, ið verður settur, at byrja við eini rættuliga sjálvstøðugari uppgávu, sum er at byggja upp eitt roknskapar- og bókhaldsverk í Stýrinum í tøttum samarbeiði við Menningardeildina.

Lýsingin finst eisini á heimasíðu okkara

www.tollskatt.fo

E-mail:

tollskatt@tollskatt.fo



# Hárfríðkanarhøllin



**Karin byrjar 1.juli 2003**

**Hava verið á skeið hjá**

STUHR
MEN & WOMEN

**Lydia, Petra, Ann & Karin**
**Hoydalsvegur 40 - tlf 31 34 49**



Kaj Andreasen & Co
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo

## Stilladsútgerð og forskallingsútgerð

HÜNNEBECK



**Til keyps og leigu:**

- Fasadustillads
- Rullustillads
- Aluminiumstillads
- Forskallingar - Nógv sløg!
- Forskallingsútgerð: Forskallingsoljur, sproytur, klams, konus, avstandsrør, binditráður, bindimaksinur, fuguband, stoypibats/isolering, armeringsjarn o.a.

Leverandørurin til byggi-entreprenørvinnuna síðan 1970!

Sosialurin 341800


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2835, P/F Vest Service, 370 Miðvágur.
**Viðtøkur broyttar:** 01.03.2003.
**Kapitalur:**
**Partapeningur:**
kr. 600.000,00, harav **Flokkur A:** kr. 450.000,00 **og flokkur B:** kr. 150.000,00
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Andrias Gaardlykke, 370 Miðvágur.
Innkomin í nevndina: Jens Gaardlykke, 370 Miðvágur.

*Skráseting Føroya tann 26. juni 2003*
*Kristin Balle*


STARV sosialurin

# Blaðfólk til Eysturoyarredaktiónina

Til at røkja spennandi, avbjóðandi og fjølbroyttar arbeiðsuppgávur verður søkt eftir blaðfólki til Sosialin.

Talan er fyrst og fremst um at røkja uppgávur á Eysturoyarredaktión okkara í Saltangará og kring alla oynna. Men tað verða eisini uppgávur á hinum redaktiónunum hjá blaðnum kring landið her serstakliga høvuðsredaktiónini á Argjum umframt á rullandi redaktiónini.

Vit hugsa okkum, at tú skal byrja eftir summarfrítíðina, helst frá fyrst í august. Møguleiki verður tó eisini at byrja fyrr.

Vit rokna við, at tú er ein persónur við áræði at fara undir nýggjar uppgávur, har tað ofta ræður um skjótt at kunna seta seg inn í tey viðurskifti, sum talan er um. At tú ert uppsøkjandi og dugir at arbeiða sjálvstøðugt undir eini ásettari tíðarfreist, og at tú hevur teldukunnleika á brúkarastøði.

Umsøkjarar við viðkomandi útbúgving hava fyrimun, men er hetta ikki nøkur treyt fyri starvssetanini.

Lønin er sambært sáttmála millum Blaðútgevarafelagið og Blaðmannafelagið.

Er ynskiligt at frætta nærri um starvið, sum kann gerast títt, ert tú sjálvandi vælkomin at seta teg í samband við Jan Müller á telefon 341800. Ella at senda teldubræv til jan@sosialurin.fo.

Seinasta freist at søkja starvið er hósdagin 3. juli. Umsóknir við viðkomandi skjølum verða at senda til:

**Sosialurin**
**Jan Müller**
**Postsmoga 76**
**100 Tórshavn**

*Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blað. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.*

Sosialurin 341800





TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Barnagarðurin millum Bóla

Stovnurin er normeraður til 40 børn í aldrinum 3-7ár.

Barnagarðurin millum Bóla liggur mitt í bygdini og stutt er oman í fjørðuna.

Barnagarðurin letur ætlandi upp týðliga í heyst

www.torshavn.fo

# Leiðari og pedagogar til Barnagarðin millum Bóla í Kollafirði

Tórshavnar kommuna søkir eftir Leiðara til Barnagarðin millum Bóla 40 tímar um vikuna. Starvið veður sett 15. august 2003.

**Vit ynskja at tú**
- ert útbúgvin pedagogur
- hevur leiðsluroyndir
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum
- hevur teldukunnleika

**2 pedagogum og 2 hjálparfólkum**
At arbeiða 40 tímar um vikuna. Størvini verða sett 15. septembur 2003

**Setanarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelagið.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Katrina Petersen, samskipara ella Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 21. juli 2003.



P/F Tórshavnar Skipasmiðja søkir eftir fólki til

AMBOÐSGOYMSLUNA

Tann, ið settur verður, fær høvuðsábyrgd av amboðsgoymsluni.
Hetta fevnir í høvuðsheitum um:

- At halda gott skil á amboðunum og á amboðsgoymsluni sum heild
- Keyp og viðlíkahald av amboðum

Tað er ein fyrimunur, at tann setti hevur útbúgving innan maskinfakið. Eisini verður stórur dentur lagdur á at viðkomandi er røkin og nærlagdur.

Starvið ynskist sett skjótast gjørligt og áhugaði kunnu venda sær til Mouritz Mohr. tlf. 31 11 55 ella 21 85 36.

TÓRSHAVNAR SKIPASMIÐJA

www.faroeyard.fo

*Tórshavnar Skipasmiðja er móðirfelag hjá samtakinum ið umfatar skipasmiðjurnar í Havn, á Skála, í Vestmanna og mekaniskan verkstað í Runavík.*
*Á skipasmiðjuni í Havn arbeiða um 170 fólk*



Sosialurin 341800



TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Barnaansingin

Barnaansingin í Tórshavnar kommunu umfatar 64 dagrøktarar, 29 dagstovnar og 10 frítíðarskúlar við tilsamans 1.700 børnum í ansing.

### Býlingshúsið undir Fjalli

Í Býlingshúsinum undir Fjalli ganga 52 børn. Stovnurin er skipaður við 2 barnagarðsstovum við 20 børnum í hvørjari og einari vøggustovu við 12 børnum. Á stovninum eru 14 starvsfólk.

### Býlingshúsið á Ternuryggi

Í Býlingshúsinum á Ternuryggi ganga 52 børn. Stovnurin er skipaður við 2 barnagarðsstovum við 20 børnum í hvørjari og einari vøggustovu við 12 børnum. Á stovninum eru 12 starvsfólk.

### Býlingshúsið á Flat

Í Býlingshúsinum á Flat ganga 52 børn. Stovnurin er skipaður við tveimum barnagarðsstovum og einari vøggustovu. Á stovninum eru 12 starvsfólk.

### Dagstovnurin Lítliskógur

Á Lítlaskógi ganga 88 børn. Stovnurin er skipaður við tveimum vøggustovum og fýra barnagarðsstovum. Á Lítlaskógi arbeiða 13 pedagogar og 6 hjálparfólk.

### Dagstovnurin við Løgmannabreyt

Í Dagstovninum á Løgmannabreyt ganga 60 børn. Stovnurin er skipaður við 2 vøggustovum við 12 børnum í hvørjari og 2 barnagarðsstovum við 18 børnum í hvørjari. Á stovninum starvast umleið 12 fólk.

www.torshavn.fo

# Barnaansingin í Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

**Býlingshúsið undir Fjalli eftir:**
- einum pedagogi 30 tímar um vikuna í vøggustovuna við 1 til 3 ára gomlum børnum
- einum pedagogi 30 tímar um vikuna í barnagarðin við 3 til 7 ára gomlum børnum

Størvini verða sett 11. august 2003

Leiðari Katrin Joensen, tlf. 314665
Fjalsgøta 25
FO 100 Tórshavn

**Býlingshúsið á Ternuryggi eftir:**
- fólki til køkin 15-20 tímar um vikuna

Starvið verður sett 1. september 2003

Leiðari Heidi Henriksen tlf. 318626
Turiðargøta 5a
FO 100 Tórshavn

**Býlingshúsið á Flat eftir:**
- einum pedagogi 30-35 tímar um vikuna í Ritustovu við 3til 7 ára gomlum børnum

Starvið verður sett 11. august 2003, ella eftir nærri avtalu

Leiðari Elsa Klein Olsen, tlf. 318371
Per Mohrsvegur 11
FO 188 Hoyvík

**Dagstovnin Lítlaskóg eftir:**
- pedagogi ella hjálparfólki 20 tímar um vikuna í barnagarð og vøggustovu

Starvið verður sett 11. august 2003. Vegna summarfrítíð skulu umsóknirnar vera stovninum í hendi í seinasta lagi sunnudagin 6. juli 2003

Leiðari Frígerð Sundsskarð tlf. 319131
Postrúm 217
FO 110 Tórshavn

**Dagstovnin við Løgmannabreyt eftir:**
- einum pedagogi 40 tímar um vikuna í vøggustovu.

Starvið verður sett 11. august 2003

Leiðari Sofía Nattestad tlf. 225782
Tórshavnar kommuna
postrúm 32,
FO 110 Tórshavn

**Vit ynskja**
at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum. Dentur verður lagdur á, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt, og megnar at taka avgerðir í tínum arbeiði.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til stovnsleiðaran ella til Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera stovninum í hendi í seinasta lagi mánadagin 14. juli 2003.



Lesið Sosialin


# Aðalfundur

hjá Eysturoyar Vinnulívsfelag 15. juli 2003 í kantinuni hjá FJM í Runavík.

**Nevndin**